LYSINGARTORGIÐ

Lýsingartreytir fyri ókeypis lýsingar:
Privatar lýsingar í mesta lagi 40 orð, bert ein lutur í hvørjari lýsing, hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Frá fyritøkum og virkjum.
Lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur«
Bill. merktar.

Minsta gjald fyri lýsingar:
70 kr. við MVG hvørja ferð.

Akfør

BILUR TIL SØLU
Volvo 240, st.car, frá 1986. Koyrir fínt. 5000 kr.
587705

SØKT VERÐUR EFTIR
einum Toyota Carina II frá 88, til eykalutir. Best er um ringt verður eftir kl. 18.
Tlf. 587093

FIAT BRAVA 1.6 TIL SØLU
Flottan bláan lit, árg. 1999, sýnaður 22.12.05. Upprunaprísur 60.000 kr. nú 30.000 kr.
Tlf. 210079

SPORTFELGUR
Fýra 17" sportfelgur við dekkum 4x100 til sølu fyri 3.000,-
Tlf. 211515

TOYOTA LANDCRUISER
4x4 pickup, koyrt 160.000 km, árg. 96, í góðum standi, til sølu.
Tlf. 517103

TOYOTA STARLET TIL SØLU
Toyota starlet árg. 93 til sølu fyri 8000kr. Koyrur, men krevur ábøtur.
Tlf. 263270

BILUR TIL SØLU
Ein Daihatsu árg.87 til sølu fyri 4000 kr.
Vinarliga ring: 444410, helst eftir kl: 18.30

BILUR TIL SØLU
Mitsubishi Lancer til sølu, árg. nov 89.
Tlf 258905, 443102

BMW 525 TDS TIL SØLU
aut., árg. 93, vælhildin og í góðum standi. 17" sportfelgur við dekkum og 15" sportfelgur við píkadekkum fylgja við. Ring og gev eitt boð.
Tlf. 267591

BMW 524 TD
árg. 91, koyrt 190.000 km. Hevur el-sóltak, el-rútar framman og ymiskt annað. Bíliga til sølu.
Tlf. 421787/253000

NISSAN PICK UP TIL SØLU
árg 99, 2,5 tdi 104hkkm 184000, 4x4 w, prísur 65000 kr.v/mvg
777040

RENAULT CLIO
Renault Clio árg. 98 til sølu vegna arbeiði uttanlands. Til salg fyri 5000,00 kr.Bilurin er høgrastýrdur. Koyrir væl. Eingin rustur. Hevur FO plátur. Sýnaður 07/2005.
Ring 455412 ella 215412

CITROEN ZX 1.4I
Koyrt 82.000 km. Árg 95. Sýnaður mai 2006. Vínreyður. Elrútar. Alufelgur. Prísuppskot 17.000 kr.
Tlf. 551041

SUZUKI ALTO
99 mod. til eykalutir, til sølu fyri kr. 3000,- Bilurin hevur skaða framman.
Tlf. 225041

EIN TOYOTA HILUX
Pick-up 4x4 ynskist bíliga til keyps.
Tlf. 586243

Alt til akfør

TIL SØLU
Dekk á felgum, passa til Peugeot 206, bíliga til sølu.
Tlf. 722583/422583

DEKK YNSKJAST
Dekk ynskjastPíkadekk ynskjast til keyps, std. 185/65/14.
Tlf. 250748

TIL SØLU
Toyota Hiace H51, árg. 1990, koyrir og hevur plátir, góðir eykalutir.
Tlf. 254216

2X2 HEILÁRSDEKK TIL SØLU
2 sum nýggj - Goodyear heilársdekk, str. 175/70-13 fyri 500,- tils. og 2 góð heilársdekk str. 175/70 13" fyri 200,- tils. Hava ikki eitt ár á baki!
Tlf. 220483

FELGUR
4 nýggjar 15" tumma felgur til sølu. Passa til Skoda Octavia.
447825

VETRARDEKK Á FELGUM
4 góð vetrardekk á felgum, til sølu fyri 2500 kr. Dekkini eru av slagnum Hankook og felgurnar passa til Honda Accord.
Tlf. 508895

LÍTIÐ BRÚKT PÍKADEKK
4 stk. lítið brúkt píkadekk á felgum 185/65 R14 bíliga til sølu. Passa til Toyota Carina E og aðrar.
Tlf. 322483

Amboð

BLANDIMASKINA
til sølu, tekur hálvan sekk, sær út sum nýggj, til sølu fyri 2.300 kr.
Tlf. 422027

Barnaútgerð

UM NAKAR HEVUR
tremmusengur, babyliftir, stólar/vognar, sum bara stendur, vildu vit gjarna tikið ímóti tí, fyri at hjálpa øðrum, sum einki eiga.
Tlf. 250528

BARNAVOGNUR TIL SØLU
Myrkabláur Simo kombivognur, hevur lufthjól, bert brúktur til eitt barn.
Tlf. 318336

Barnaansing

BARNAGENTA
Eg eiti Miriam og ynski at verða passa av tær, tí mamma og babba skulu til arbeiðis. Eg eri ein fitt lítil genta og eri hálvt annað ára gomul. Alt hevur áhuga.
Tlf. 226700

Bátaútgerð

STARLET 29 VIÐ FISKILOYVI
til sølu um hóskandi boð fæst. Er útgjørdur til línu- og snelluveiðu. Ring og hoyr meira á
Tlf. 275049

TIL SØLU
eitt kraft bokspøl til sølu, kann brúkast til at draga gødn og línu og 160 goggu glúpar.
Vinarlig ring tlf 287042

ER TAÐ NAKAR,
ið eigur ein lítlan føroyskan árabát til sølu fyri sámuligan prís. Nýtist ikki at kunna sigla. Skal nýtast í einum garði til børn. Kann gott avheintast.
Tlf. 227735/256832

Bingo

FRÁ TÓRSHØLL
Gott nýggjársbingo verður leygarkvøldið 6. januar kl. 19. Høvuðsvinningur á lutaseðli gávukort 1000 kr. Annars nógvir aðrir góðir vinningar. Øll vælkomin.
Tórshøll

Burturm. /funnið

SVARTUR LEÐURJAKKI
Hevur tú av misgáum tikið mín leðurjakka nýggjársaftan úr klubbanum í Klaksvík. Vinarliga ring til mín á
506929

BURTURMIST
Reyður sminkupungur mistur á handilsøki í Klaksvík í jólavikuni, um onkur hevur funnið vinarliga ring
517820

TASKA BURTURMIST
Svørt Friis & company taska burturmist í klubbagarðinum 2. jóladag. Tann, ið hevur tikið ella funnið hana, verður vinarliga biðin um at ringja á
Tlf. 424438

TVEIR JÓLAPAKKAR
gloymdir í Logos bókasølu í Havn 23. desember. Á øðrum stendur: til Poul Edvard frá Tórun, Páll, Hendrik og gummu og á hinum: til Cathrine frá Tórun, Páll, Hendrik og mostir.
Logos, tlf. 316519

TIT, SUM LÆNTU
stóru grýtuna frá J. Dahlsgøtu 13 yvir jólini, vinarliga stilla hana aftur. Gott nýggjár.

Býli í Føroyum

TVÆR GENTUR
ið ganga í studentaskúla, søkja íbúð við 2 kømurum í Havn. Fara væl um og gjalda til tíðina.
Tlf. 256239/256208

ÍBÚÐ YNSKIST Í HAVN
Vit eru eitt ungt par fyrst í 20´unum, ið leitar eftir eini íbúð í Havn. Vit eru friðarlig, fara væl um og gjalda til tíðina.
Tlf. 267347/257400

HÚS/ÍBÚÐ YNSKIST!
Hey! Eg eri ein mamma við 3 stórum børnum, ið søknist eftir bústaði til leigu skjótast tilberð í Tórshavn, á Argjum ella í Hoyvík.Vit fara væl um og gjalda til tíðina.
Ring 590807

VERILSI YNSKIST TIL LEIGU
í Tórshavn í góðum og friðaligum stað av edrúiligari og roykfríari kvinnu skjótast gjørligt.
Tlf. 581472 millum kl. 12 og 14

KAMAR/ÍBÚÐ Í HAVN YNSKIST TIL LEIGU
Ein 26 ára ungur maður, drekkur og roykur ikki leitar eftir einum staði at búgva mitt í Havnini. Vinaliga ring á 220162 um tú hevur okkurt at bjóða. Leiga yvir 2500 ongan áhuga.
Tlf. 220162

HÚS TIL SØLU
Um hóskandi boð fæst, vera eini eldri hús í Leirvik seld. Húsini eru nýumvæld, og øll undiretagan er nýggj.
Áhugað ring. 588738/250581

ÍBÚÐ Í HAVN TIL LEIGU.
Góð lítil íbúð í Havn til leigu í 5 mánaðir , frá 11/01 og til miðan juni mánaða í ár. Leigan hvønn mánaða er krónur 5000- (alt íroknað), og trygdarinnskot á kr. 7.500- er at gjalda.
ibud@forum.dk

JARÐARSTYKKI Í SØRVÁGI
Um hóskandi boð fæst, er eitt jarðarstykki á 700 fermetur mitt í gomlu bygdini í Sørvági til sølu. Áhugað kunnu ringja á tlf. 281948 ella E-mail ájhn@post.olivant.fo
281948

ÍBÚÐ Í HAVN YNSKIST
Vit eru tvær ungar kvinnur, ið leita eftir eini góðari íbúð. Vit báðar hava fulltíðararb., vit roykja ikki, eru álítandi og sera hampuligar. Um tú kanst hjálpa okkum, so vinarliga
ring á 259337 ella 226093

KJALLARAÍBÚÐ Í SØRVÁGI
Kjallaraíbúð á Bakkavegi 31 í Sørvági til leigu frá 1. mars.
Tlf 314103

ÍBÚÐ SØKIST
Lítil, so væl sum stór, til kvinnu við tveimum børnum í høvuðsstaðarøkinum.
Tlf. 584059

ÍBÚÐ YNSKIST Í HAVN
Eg søknist eftir íbúð í Havn, eg havi børn, eri friðarlig, royki og drekki ikki, gjaldi til tíðina. Vónandi hava tit eina íbúð tit vilja leiga til mín. Skriva til Sosialin, box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 2497

HÚSINI VIÐ VØRÐUVEG 2
Hósvík eru til leigu. Eru í góðum standi. Gott útsýni. Bert 50 metrar til bussteðg. Samskifti tlf. 422292 eftir kl. 18 ella mail:thala@post.olivant.fo
Tlf. 422292 eftir kl. 18

ÍBÚÐ SØKIST
Ungt par søkir íbúð í Havn. Alt yvir 5000 kr um mðr. ongan áhuga. Bæði hava fast starv.
Tlf. 252040/250575

ÍBÚÐ TIL SØLU
Íbúð í Maritugøtu til sølu, stødd 73 fermetrar. Stova og køkur í einum, 2 kømur, gongd og baðiverilsi. Skúrur 4 fermetrar.
Bill.mrk. 2492

ÍBÚÐ Í MIÐBÝNUM Í HAVN TIL LEIGU
Ein íbúð nærindis miðbýnum í Havn til leigu. Hon er til støddar umleið 90 fermetrar: Durur, gong, WC, tvey kømur, stór stova, køkur, goymslurúm. Vælegnað til tvey friðarlig fólk. Depositum krevst. Kostnaður: 5.500 kr + ljós og hita. (1.500 kr)
Tel 584107

Býli uttanlands

KAMAR TIL LEIGU
frá 1. januar 2007 á Amager í Kbh.
Tlf. +45 27206866

ÌBÚÐ Í KBH
Vit eru eitt studerandi par, sum leita eftir ìbúð í KBH umráðinum, fyri ca. 5000kr um mánaðin. Vinarliga ring til:Joen Palui Klein Rasmussen. +4528891183
E-mail: joen_klein@yahoo.dk

ÍBÚÐ/KAMAR Í KEYPMANNAHAVN
Havi fingið eina størri arbeiðsuppgávu í Kbh. Ynski at framleiga eina íbúð/kamar í stytri tíðarskeið. www.torben-nielsen.com
Tlf. +45 23642859

ÍBÚÐ/KAMAR YNSKIST
Íbúð/kamar ynskist til leigu í Herning, ella nærhendis. Frá 1. feb til 5. feb.
Vinarliga ring 422877 ella 722583

Dansur

ALMENNUR FØROYSKUR DANSUR
verður í Sumba leygarkvøldið 6. januar kl. 22. Feløgini í oynni luttaka.
Sumbiar Dansifelag

DANSISTOVUGAMAN DANSAR
Fyrsta dansikvøld í nýggja árinum er sunnukvøldið 7. jan. frá kl. 20 til 22 í skúlagarðinum í Trongisvágs skúla. Nýggir dansarar eru vælkomnir.
Nevndin

Dýr

SVØRT, TOM,
vaksin ketta fór út týsmorgunin frá Stoffalág 66 og er ikki sædd síðani. Veitst tú nakað um hana, so ring vinarligast til
Tlf. 313697/513697

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Alt til akfør	❑ Amboð
❑ Arbeiði	❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð
❑ Bátaútgerð	❑ Bingo	❑ Brævaskifti
❑ Burturm./funnið	❑ Býli	❑ Býli uttanlands
❑ Bøkur	❑ Dansur	❑ Dýr
❑ Fartelefonir	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Lutaseðlar	❑ Leikur
❑ Matur	❑ Pløgg	❑ Samband
❑ Súkklur	❑ Teldur	❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp	❑ Ymiskt	❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl 12.00 dagin fyri útgávudagin, t.v.s. at lýsingin til mánadagsblaðið skal vera okkum í hendi fríggjadag á middegi.
Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.
Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……....

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki